# Mentamálaráðið
YRKISDEPILIN

## SKRIVSTOVUFÓLK

**Starvið**
Av tí at skrivstovufólk okkara hevur valt at taka við øðrum avbjóðingum í Yrkisdeplinum, er eitt áhugavert og fjølbroytt fulltíðarstarv sum skrivstovufólk leyst at søkja í Yrkisdeplinum við møguleikum fyri fakligari og persónligari menning við skiftandi uppgávum.

**Arbeiðsøki**
Í høvuðsheitum at arbeiða við øllum vanligum fyrisitingarligum uppgávum og at hava skrivligt og munnligt samskifti við viðskiftafólk, t.e. lærupláss, lærlingar, yrkisskúlar, yrkisnevndir og onnur innan arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarøkið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjari:
- Hevur handilsskúlaútbúgving og royndir í skrivstovuyrkinum ella aðra javnsetta útbúgving og royndir,
- hevur góðan teldukunnleika og kunnleika til mál, serliga føroyskt, og
- hevur góð samstarvsevni og førleika at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanarøkið fevnir um alt stjórnarráðið og tess stovnar.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

Yrkisdepilin
Postrúm 3279
FO-110, Tórshavn

ella sum teldupostur til: eydung@yrkisdepilin.fo

Umsóknir skulu vera Yrkisdeplinum í hendi í seinasta lagi 19. november 2007, kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Upplýsingar um virksemið hjá Yrkisdeplinum eru at finna á heimasíðuni: www.yrkisdepilin.fo

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Eyðun Gaard, fyrisitingarleiðara, tlf. 555066.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Yrkisdepilin** er ein sjálvstøðug fyrisiting í Mentamálaráðnum, sum fyrisitur arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmál, herundir at vera fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum. Yrkisdepilin fyrisitur eisini ávís viðkomandi málsøki fyri Mentamálaráðið, herundir at avgreiða ferða- og lønarendurgjald til lærupláss o.l.



## Kunngerð

Sum áður lýst verða allir ómerktir bátar, bátavognar og bátastólar á havnaøkjunum hjá Tórshavnar kommunu, sum ikki vóru tiknir burtur áðrenn 1. november, fyribeindir fyri eigarans ábyrgd og rokning.

Tórshavnar havn

## Fyribilsstarv sum stýrimaður

Eitt fyribilsstarv sum stýrimaður á Sam er leyst at søkja á Strandfaraskip Landsins. Viðkomandi skal byrja beinanvegin, og starvstíðin er fram til 20. oktobur 2008. Umsóknarfreistin er 8. novembur. Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS




Lesið **Sosialin** -tað loysir seg

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Kunngerð

Fráboðaða fólkatingsvalið fer fram

**Týsdagin tann 13. november 2007**
**í veitsluhøllini á Vesturskin, á Toftum.**

Atkvøðutíðin er frá:

**kl. 09.00 til 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi leygardagin 10. november 2007 greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøðurnar skulu vera valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl. 09.00 tann 13. november 2007.

**Heimaval**
Veljarar, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagið leygardagin tann 10. november 2007, við at boða frá til fólkayvirlitið á kommunuskrivstovuni **tlf. 447586** helst innan kl. 15.00 fríggjadagin 9. november 2007.

**Valkort**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna og valkortini verða sent út við postinum til allar veljarar, ið standa á vallistanum. Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá sum skjótast.

*Toftir, hin 30.november 2007*
**Valstýrið í Nes kommunu**

Reyði Krossur Føroya

# Lær 1. hjálp
**Skeið byrjar 18. nov. 2007**
**um undirtøkan er nóg stór.**
**Kostnaður kr. 700,-**

Sí heimasíðuna
**www.redcross.fo**

**Reyði Krossur Føroya**
redcross@redcross.fo
Tlf. 283630 ella 317841